Tíðindablaðið
**sosialurin**
Internet: www.sosialurin.fo

**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
**Tíðindaleiðari:** Jústinus Eidesgaard

**Blaðfólk:** Áki Bertholdsen, Turið Kjølbro, John Johannessen, Sveinur Tróndarson, Eyðun Klakstein, Edvard Joensen, Stefan í Skorini
**Ítróttur:** Jákup Mørk
**Myndamenn:** Jens Kristian Vang, Álvur Haraldsen
**Marknaðardeild:** Jonhard Hammer, Dagbjørt S. Hansen, Hjørdis Árnadóttir
**Útgevari, uppseting:** Sp/f Sosialurin
**Bústaður:** Argjavegur 26, Argir

**Postadr:** Postsmoga 76, 110 Tórshavn
**Telefon:** 311820 **Fax.** 314720
**e-mail:** post@sosialurin.fo
**Lýsingar:** lysing@sosialurin.fo
**Prent:** P/F Prentmiðstøðin

# Ein ólukkulig støða

## *Oddagrein*

ALLUR heimurin bíðar í spenningi eftir, at okkurt skal spyrjast burtur úr samráðingunum í Egyptalandi um ólukkuligu støðuna í Ísrael. Ein ólukkulig støða er tað, tí hon tykist so fastløst og ómøgulig at koma burtur úr við góðum. Hon fær okkum at hugsa um „norðurírskar tilstandir“, har ein atsókn ella gerð førir við sær eina aðra. Tað er sum skrúvan uttan enda: ein óendalig røð av atsóknum og hevndaratsóknum móti hvørjum øðrum, ísraelar móti palestinum og øvugt, har eygað fyri eygað terminologiin ræður.

TAÐ er neyðugt at fara aftur í søguna til tess at skilja hetta málið - til uppruna Ísraels og til krav/rætt palestinaranna til sítt egna land. Friðartilgongdin í Miðeystri hevur gingið væl og hevur tað við samráðingum og dialogi eydnast at fáa partarnar at binda frið. Men nú palestinar loksins vildu seta dagin fyri stovnsetan av einum palestinskum stati kom kuril í. Palestinar øðrumegin halda, at teir nú hava bíðað leingi nokk og hava teir eisini sett krøv fram um, at Jerusalem verður teirra høvuðsstaður. Ísraelar hinumegin vilja uppá ongan hátt lata Jerusalem frá sær, og teir nokta at samráðast, soleingi palestinar brúka harðskap. Men um somu tíð sum tosað verður um ein ein palestinskan stat og um framtíðina hjá Jerusalem halda ísraelar fram við at byggja nýggjar bústaðir í økjum, sum palestinar siga seg eiga. Hetta skapar sjálvandi frustratiónir og endar tað í eljustríði, har børn og ung tveita grót eftir væl vápnaðum ísraelskum løgreglumonnum og hermonnum, sum skjóta aftur við vandamiklum gummikúlum.

UPPREISTURIN, sum palestinar, hava sett í gongd, verður av ísraelum uppfataður sum veruligt kríggj. Palestinar hinumegin kenna seg provokeraðar til at vísa á sína ónøgd, og tað at meira enn 100 palestinar eru deyðir ger støðuna nærum óloysiliga. Tað syrgiliga er, at hesin uppreistur hevur givið høgrakrefturnum vind í seglini, soleiðis, at stjórnin við tí meira moderata arbeiðaraflokkinum nú kennir seg noydda til at taka víðgongdar jødar sum Sharon, slaktaran frá Chatilla-flóttaleguni í Libanon á sinni, við í stjórnina. Sohvørt royndir verða gjørdar at fáa partarnar aftur til samráðingarborðið, royna teir viðgongdu á tí palestinsku síðuni at gera alt fyri at seta kílar í. Og soleiðis heldur hetta ólukkuliga stríð fram.

TAÐ er ikki lætt hjá okkum her heima at taka støðu í hesum málinum, nú teir víðgongdu hjá báðum síðum eru um at stjala myndina. Tá er jú øll vón úti fyri eini loysn. Tí - hvat man enn heldur um ísraelar og palestinar og søk teirra, so er bert ein gongd leið burtur úr hesum trupulleikum, og hon er hóvligi samráðingarvegurin. At brúka harðskap og seta ultimativ krøv førir ikki til nakað. Tí hava vit brúk fyri hóvligum leiðarum á báðum síðum. Vit hava eisini brúk fyri einum amerikonskum forseta, sum framhaldandi roynir friðarleiðina, og har roynir at skilja báðar partar. Tíanverri kann núverandi støðan gera, at vit fáa ein víðgongdan amerikanskan forseta væl stuðlaðan av jødalobbiuni. Er tað nakað, sum heimurin ikki hevur brúk fyri, so er tað ein republikanskur forseti í USA, sum einvíst leggur seg á kósina hjá teimum viðgongdu jødunum. Heimurin hevur brúk fyri einum amerikonskum forseta, sum heldur høvdið kalt í slíkum máli. Tí skal tað vera vón okkara, at Al Gore verður eftirmaður Clintons og førir víðari hóvligu kósina.

MÁLIÐ er kanska nógv meira vandamikið enn flestu okkara hugsa. Tí tað er so eldfimt. Hóast palestinar eingi vápn hava, so hava teir ein muslimskan heim, sum stuðlar søk teirra. Hetta er at meta sum ein nógv sterkari vápn enn tann vælútgørdi ísraelski herurin. Vil heil illa til, so kann hetta stríð elva til eitt heimsumfatandi stríð millum muslimar og so onnur, har tað serliga verða bretar og amerikanarar, sum koma at kenna sviðan, men eisini allur Vesturheimurin, um arabar fara at brúka oljuna sum vápn. Tað er tí øll orsøk til at vísa hóvsemi og framhalda dialogin.

***Sosialurin***

# Ein seinkað heilsan nú Alex Sólstein fylti sjeyti



Tað átti ikki at komið brádliga á meg, at Alex Sólstein fylti 70 í ár. Eg vitsti, at hann sá dagsins ljós í 1930. At hann hevði føðingardag út á heysti, var eg eisini greiður yvir.

Nú er hjá mær at taka úr rúgvuni av dygdum og evnum, hesin sprelski og lættlynti unglingi hevur. Tað gerst ikki í eini stuttari føðingardagsgrein. - Tó fari eg at royna at seta nøkur orð á prent.

Alex er eitt produkt av náttúruni, sum fevnir Klaksvíkina. Hesi høgu og vøkru fjøll við sjógvi bæði í norðan og sunnan hevur í hansara verumáta havt síni árin á hann.

Hann er áhugaverdur og lívligur frásøgumaður. Vit minnast eisini, tá hann var kórleiðari í Klaksvíkar Sangfelag, tá hann við lív og sál leiddi kórið. Sum hornblásari er hann altíð í oddinum, og eingin ivast, tá hann blæsur, hvørjar tónar hann ætlar sær at skapa.

Fiólin er hansara hjartabarn, og tað er tí einki løgið í, at hann var ein av stovnarunum av Føroya Symfoniorkestri, har hann er formaður.

**Mentamaður av musikalskari ætt**

Av og á havi eg sammet Alex við ein einsaman rennara, tá eg hugsi um hann við fiólini, sum einasti violinistur her millum fjøllini. Her hevur hann sitið, staðið, gingið, (ja kanska eisini runnið) og vant við fiólini og hevur ígjøgnum árini verið ein habilur fiólspælari. - Eg giti, at hann av og á - eins og rennarar - hevur kent seg einsaman, men at hetta hevur fylt væl í lívi hansara er eingin ivi um, og úrslitini hava verið góð.

Katrin hevur verið Alexi ein góð kona. Hon er fryntlig, rólig og eingin ivi er um, at henda kombinasjónin hevur verið børnunum sera áhugaverd og hevur eisini gjørt tey dugnalig á ymiskum økjum. Dótturin Birgit er búsett í Bretlandi, og hevur búð har í mong ár.

Afturat teimum evnum tey annars hava fingið, hava synirnir verið Klaksvíkar Hornorkestri góðir stuðlar. - Eg kundi hugsað mær, at Katrin onkuntíð er troytt, tá Alex venur uppá tað mesta! Tað er kanska einki at siga til, at har eru góð musikalsk evnir. Alex er sonur Palla Sólstein, ið hevði góða rødd sum kirkjusangari, og í hina ættina, frá mammuni Birgithe, er Alex í ætt við Waagstein. Vit, sum minnast Sámal Petersen sum lærara í sangi, vita eisini, at hesin var mammubeiggi Alex.

Í tríggjar mánaðar høvdu vit í millumskúlanum Alex Sólstein sum lærara í týskum. - Tað er einki at taka seg aftur í, at hann lá í oddinum sum nærlagdur lærari, og hansara evnir sum pedagogur vóru heilt ómetalig.

Annars gjørdist tað ein heilt nýggj tíð í skúlanum, tá Alex og aðrir ungir lærarar tóku við starvi í Klaksvíkar Skúla, og vit næmingar, sum tá gingu í fjórða flokki, fingu sanniliga okkara sak fyri, bæði í fimleiki og í øðrum lærugreinum. - Hetta vóru veruliga nýggjar tíðir.

Alex er ein vitandi mentamaður og hevur tí heilt náttúrliga á ein ella annan hátt verið við í flestu mentanarátøkum, eitt nú í útgávuni av Hugnalig jól, og hann var so sanniliga ein av teimum sum legði støði undir Rukkulakkan.

**Skapti respekt**

Hansara lívsverk gjørdist skúlin.

Alex søkti skúlastjórastarv við Klaksvíkar Skúlaverk í 1961 bert 30 ára gamal. Hann fekk hetta starvið og gjørdist við hesum, mær kunnugt, yngsti skúlastjóri í danska kongaríkinum.

Sum lærari og seinni skúlastjóri kann sigast um Alex, at hann skapti respekt og greiddi at halda uppi einum góðum morali. Sum skúlastjóri bert 30 ára gamal kundi eg hugsað mær, at hann av og á fekk trupulleikar við eldru lærarunum, ið høvdu lagt síni lek og sínar ræsir, sum ikki vóru lættar at broyta. - Men hann greiddi hetta væl. Hann var stundisligur, kendi hvørt einasta barn við navni, og sum rættur pedagogur og hirði dugdi hann at síggja, hvar evnini hjá børnunum lógu.

Í seinni árum hava vit báðir havt eitt gott samstarv - onkuntíð hava samrøðurnar okkara millum kanska gingið í so lívligar ella agressivar - men eg skal siga um Alex, at vit hava altíð kunna vent aftur hvør til annan, har vit hava verið samdir um, at her í Klaksvík skal skapast nakað.

**Klaksvíkar Býráði ein hollur stuðul**

Hann hevur verið Klaksvíkar Býráði ein ótrúliga góð hjálp, tá vit hava fingið fremmandar gestir. - Ofta, tá eg aftur havi møtt hesum fremmandafólki, minnast tey fram um annað hendan áhugaverda frásøgumannin Alex Sólstein. - Hann hevur verið Klaksvíkini ein góður guide, sum tað nú eitur á góðum føroyskum.

Eg havi eisini í seinastuni sett hann saman við øðrum í eina nevnd, sum eg ikki skal koma nærri inn á her. Her hevur hann eisini gingið inn í arbeiðið við stórum áhuga.

Góðu Alex og Katrin. Sum eg segði at byrja við, so er torført at taka úr rúgvuni av teimum góðu gávum, Alex hevur fingið. - Tú hevur fingið loyvi at brúka hesar. Tú og tit kunnu takka Gudi, bæði fyri góðar gávur, heilsu og eitt inniligt familjulív. Tað er so nógv.

Alex, ein hjartans tøkk skal ljóða frá mær fyri ta hjálp, tú hevur verið mær og Klaksvíkar Býráði øll hesi mongu ár, eg havi sitið sum borgarstjóri, og ynski frá mínari síðu er, at hetta samstarvið heldur fram.

Harrin signi bæði teg og øll tíni.

Bestu heilsanir

**Jógvan við Keldu**

## Treytir fyri valgreinar

Av royndum vita vit, at sera nógv verður skrivað, tá val er í hondum. Tí hevur blaðleiðslan gjørt av, at innsent politiskt tilfar í samband við kommunuvalið komandi verður avmarkað í longd til eina A4 síðu í vanligari skrift - ella áleið 3.000 tekn - saman við andlitsmynd av valevninum.

Øll valevni er kortini vælkomin at skriva í Sosialinum, men tilfar, ið ikki lýkur treytirnar, kemur ikki í blaðið.

**Blaðleiðslan**

## Eingin føroysk umsókn

JÁKUP MØRK

Danski-mentunargrunnurin hevur í tíðindaskrivi boðað frá, at grunnurin hevur játtað Christinu Siggaard, Hortonomlesandi, úr Keypmannahavn legat til eina námsferð í Føroyum.

Víðari upplýsir grunnurin, at eingin umsókn var innkomin úr Føroyum, um stuðul til námsferð í Danmark.

Komandi ár verður móttakarin av legatinum almannakunngjørdur 3. september, og skulu umsóknir til hetta vera grunninum í hendi innan 1. juni 2001.



# Seinastu flóttafólkini komin

*Tey seinastu av teimum eysturslavonsku flóttafólkunum, sum søktu innferðar- og arbeiðsloyvi í Føroyum, komu higar mánadagin*



*Seinastu eysturslavonsku flóttafólkini komu til Føroya mánadagin og búgva fyribils á Runavíkar Sjómansheimi*
*Mynd: Jens K. Vang*

EDVARD JOENSEN

Mánadagin komu 11 eysturslavonsk flóttafólk við flogfari úr Danmark til Føroya. Tey búgva í løtuni á Runavíkar Sjómansheimi.

Talan er um tvær familjur, og tveir leysar, ungar menn. Í aðrari familjuni eru maður og kona við tveimum børnum. Í hini familjuni eru somuleiðis maður og kona við tveimum børnum, umframt ein 11 ára gomul systir mannin. Teir báðir støku menninir eru ávikavist 22 og 24 ára gamlir.

Jákup Pauli Olsen, ið hevur verið ein teirra, sum hevur arbeitt við at fáa hesi fólkini til Føroya, sigur, at hóast tey nú eru komin higar, og tykjast væl nøgd við tað, hevur tað tikið alt ov langa tíð at koma so langt.

Hann sigur, at tað tykist, sum hesi fólkini eru sera væl móttikin. Tað, hann dugir at síggja, hava tey bara møtt útrættum hondum í Føroyum, sigur hann. Mánakvøldið vóru tey saman við hinum eysturslavonunum, sum komu úr Danmark í fyrra umfari. Og tey fólkini hava verið til ómetaliga stóra hjálp, nú hesi seinnu komu.

Støðan í Danmark var fastlæst, sigur Jákup Pauli Olsen. Fólkini fingu noktað friðskjól í Danmark, men sluppu til Føroya eftir eini gamlari lóg, sum framvegis er í gildi í Føroyum, men ikki í Danmark. Loyvi at koma til Føroya fingu tey, eftir at føroyskar fyritøkur høvdu játtað teimum arbeiði og okkurt at búgva í.

Í løtuni tykist tó eitt sindur trupult at fáa nakað at búgva í á eystara armi við Skálafjørðin, har fólkini nú eru. Jákup Pauli Olsen sigur, at tey tí fyribils verða hýst á Runavíkar Sjómansheimi.

Tey eru eitt sindur ymiskt fyri málsliga, nú tey koma hendanveg. Onnur familjan er rættiliga væl fyri. Tey hava havt eina skipaða tilveru í Danmark. Børnini hava gingið í skúla og duga heilt væl danskt.

Eitt sindur verri stendur til við hinari familjuni. Har duga tey vaksnu als einki danskt mál. Maðurin dugir ikki eitt orð av enskum, meðan konan so dánt klárar eina samrøðu. Børnini siga seg skilja eitt sindur av donskum, men duga ikki at tosa tað kortini. So har verður eitt sindur torførari at koma ígjøgnum, sigur Jákup Pauli Olsen.

Hendan seinna familjan hevur havt serligar trupulleikar at drigist við, tí talan er um blandað hjúnalag. Maðurin er serbi, meðan konan er kroatisk. Tað vilja kroatar als ikki góðtaka, so myndugleikarnir har niðri hava tikið pass hennara við eftirnanavninum hjá manninum frá henni, og latið hana fingið eitt annað við gentunavninum á.

Av hesum stóðust onkrar smávegis seinkingar í passeftirlitinum á flogvøllinum, tí myndugleikarnir ongastaðni dugdu at síggja, at talan var um mann og konu, greiðir Jákup Pauli Olsen frá.

Flóttafólkini, sum komin eru hendanveg, hava øll fingið tilboð um at læra føroyskt í kvøldskúlanum. Skeið í føroyskum verða regluliga hildin fyri vaksin fólk, sum ikki hava føroyskt sum móðurmál. Men Jáup Pauli Olsen væntar, at tað verður harður skúli, tí málini eru so ólík. Her er einki felags millum føroyskt og teirra móðurmál.

Men tey hava fingið so mikið gott álit á føroyingum beinanveg, tey komu, at fleiri longu hava teknað seg til málskeiðini, sigur Jákup Pauli Olsen.

# Dagrøktarmammur fáa munandi lønarhækking

*Stór framstig eru gjørd í royndunum at fáa sáttmála fyri dagrøktarmammurnar kring landið. Í allarflestu førum ber sáttmálin í sær, at dagrøktarmammurnar fáa eina munandi lønarhækking*



*Tað er rættiliga komið glið á royndirnar at útvega dagrøktarmammum kring landið betri og tryggari arbeiðsumstøður. Samráðingar verða aftur í næstu viku og tá væntar Føroya Arbeiðarafelag at eitt úrslit spyrst burturúr*

ÁKI BERTHOLDSEN

Seinastu dagarnir eru stór framstig gjørd í royndunum at fáa dagrøktarmammum kring alt landið betri og tryggari sømdir at arbeiða undir.

Tað hevur annars gingið strilti at fáa sáttmála fyri hendan bólkin á arbeiðsmarknaðinum, men nú er rættiligt glið komið á.

Føroya Arbeiðarafelag gjørdi herfyri sáttmála fyri dagrøktarmammurnar í Kollafirði.

Og nú er eisini sáttmáli gjørdur fyri dagrøktarmammurnar í Hósvík.

Annars hevur Føroya Arbeiðarafelag strongt á at fáa samráðingar við tey bæði kommunufeløgini um sáttmála fyri dagrøktarmammurnar.

Mánadagin var fundur við Býarfelagið um sáttmála fyri dagrøktarmammurnar í kommununum, sum eru limir har.

Talan er um dagrøktarmammurnar í Vági, á Tvøroyri, í Runavík og í Fuglafirði.

Tvær aðrar kommunur eru í Býarfelagnum, Tórshavnar- og Klaksvíkar Kommuna, men dagrøktarmammurnar har eru undir sáttmála við Starvsmannafelagið.

**Gingu væl**

Ingeborg Vinther, forkvinna í Føroya Arbeiðarafelag, sigur, at samráðingarnar við tær fýra kommunurnar í Býarfelagnum gingu væl.

– Vit komu ikki á mál, men samráðingarnar eru í einum positivum anda.

Hon sigur, at fundur er avtalaður aftur í næstu viku og tá væntat hon, at tað fer at eydnast at semjast um ein sáttmála.

Tað er mest lønarspurningurin, sum skilir partarnar.

– Men munurin er ikki størri enn so, enn at tað eigur at eydnast at finna eina semju.

Ingeborg Vinther sigur, at dagrøktarmammurnar hava yvirhøvur verið sera illa løntar og at sáttmálin fer í nógvum førum at bera í sær at tær fáa eina munandi lønarhækking.

Eftir sáttmálanum, sum er gjørdur við Hósvíkar Kommunu, fáa dagrøktirnar har nú 3.120 krónur um mánaðin fyri hvørt barnið.

Ein triðingur av lønini er skattafríur og er roknaður sum endurgjald fyri millummála til børnini, til at gera tað aftur í húsunum, sum børnini oyðileggja o.s.fr.

Tá ið sáttmálin við Býarfelagið er fingin fra hondini, er eftir at fáa sáttmála við kommunurnar í Kommunufelagnum.

Men fundur er eisini avtalaður við Kommunala Arbeiðsgevarafelagið í næstu viku.

Orsøkin til, at sáttmáli er gjørdur fyri dagrøktarmammurnar í Hósvík fyri seg, er, at Hósvík er ikki limur í nøkrum av teimum báðum kommunufeløgunum. Og Kollafjørður fer, sum nevnt undir Havnina á nýggjárinum.

Tá ið sáttmálarnir við Býarfelagið og Kommunufelagið eru komnir í lag, eru allar dagrøktarmammur undir sáttmála við Føroya Arbeiðarafelag, uttan tær í Havn, Klaksvík, Sørvági og á Skála, sum eru í Starvsmannafelagnum.